Til fíggjarnevndina.

Undirritaði er formaður í FFU (føroyskir fiskimenn uttanlands) hetta er eitt felag har okur allir eru sjómenn, og eingin fær løn frá felagnum, tað bleiv stovna fyri nógvum árum síðan, teir vunnu tá sakina um samdøgursfrádráttin.

Her koma tey punktini sum fara at raka okkum sera hart

1. 154B frádrátturin.
   Sagt verður at hann skal avtakast tí man sleppur undan heilsutrygd og samhaldsfasta í føroyum.
   Tað er bara partvís rætt, fyri nøkrum árum síðan kom tvungin pensión, í føroyum gjaldir arbeiðsgevarin tað mesta av pensjónini, vit sum fiska í norra máttu og mugu gjalda alt sjálvir, tí vit eru við norskum fiskiskipið, har arb.gevarin ikki gjaldir fyri okkum.
   Tá pensiónin kom, sluppu vit tey fyrstu árini at draga hana frá í skatti, seinni bleiv so norska folketrygden góðkend sum pensión, so tað er upplagt at man kan draga hana frá lønini.
   Sum er kann man velja at gjalda í føroyum í staðin, tí heilsutrygd og samhaldsfasti er ein nógv minni upphædd enn folkatrygden í norra, men hvat so við pensiónini, gangi útfrá at man so má yvur aftur til tvungnu pensiónina um man velur at gjalda í føroyum, og um man velur tað, fær man so drigi hana frá skattinum?
   Grundin til at menn valdu meir og meir at gjalda í Norra, var og er at man er nógv betri stillaður, tað vóru dømir um menn sum duttu ímillum, í norra bleiv sagt, tú býrt í føroyum, og í føroyum søgdu tey, tú arbeiðir í norra.
   Og skuldi tað hent at sjúka ella skaði rakar ein, so fær norðmaðurin útgoldið frá NAV DKK 45000 um mánaðin, meðan tann sum velur at gjalda í heilsutrygd, fær ca. DKK 18000 um mánaðin, og so eru pensiónsviðurskiftini betri í norra.
   So bara tað at 154B skal burtur, gevur okkara limum 8,2% meir í skatti í komandi ári, og so fyri ikki at tosa um tá hini frádrøgini eru burtur eisini.
   Sjálvur havi je í nógv ár goldið umleið 42% í skatti, so man sær fyri sær 50% og upp eftir.
   Samanlíkna vit okkum við limir í Antares, so er munurin, sum je dugi at síggja, at teir skatta í norra, og har er folketrygden innrokna í skattinum, so teir leggja ikki í 154B frádráttin.
   Sonman má als ikki samanlikna teir sum sigla I offshore vinnuni, teir gjalda skatt I Noreg og har er norsk folketrygd irokna, føroyskir fiskimenn I Noreg , eru teir einastu sum eru fult skattskildigir I Føroyum.

   2 sjómannafrádrátturin.
   Um hann er ikki so nógv at siga, uttan tað at hann skal hava frið, ella hækkast, 15% av 600000 kundi verið ein góð byrjan.
   Mangan er súrt at buldrast á føroya grunnunum.
   Haldi allir sjómenn vilja varveita sjómannafrádráttin.
   Í norra hevur hækka sjómannafrádráttin úr NOK 115.000 til NOK 154.00, I føroyum velur man at lækka

Vit hugsa at sjómenn vera ikki nógv virdir.

3 samdøgursfrádráttur.

Samdøgursfrádrátturin kom pga. Meirútreiðslum við at ferðast og húsast í uttanlandsarbeiði, hondverkarnir fingu, men fiskimaðurin fekk ikki, tá bleiv felagði FFU stovna, og vunnu teir tað Sakina, so allir fiskimenn uttanlanda fingu 300kr um dagin.

Fleiri hava nevnt at vit ikki hava rætt til hendan frádrátt tí vit einki gjalda sjálvir, tað er als ikki rætt, reisurnar fara av óbýttum, og øll manningin luttekur, og so kemur so sum ferga, taxi, bus, matur oa. Afturat, og ofta noyðist man at yvirnátta eisini.

4 hví arb. Føringar uttanlanda.

Tað verður ofta nevnt at føringar sigla uttanlands tí tað er nógv meir at forvinna og betri sømdir.

Tað er bara partvíst rætt, vit eru nógvir í tali, og tað er slett ik kjansur til allar her heima.

Skipið sum je var við bleiv selt í vár, síðan have je verið avloysari við tveimum skipum, og have roynt at fáa kjans heima hetta hálva árið, og tað vísir seg at vera hopleyst, nú havi je so fingið kjans aftur í Norra

Eisini verður sagt at vit mangla arbeiðskraft í Føroyum tí so nógvir føringar arbeiða uttanlands, hvat skudlu vit sjómenn gjørt her heima a landið, arb sum tænarir, ella bora tunnlar, hugsi tað má vera betri at koma í landskassan við einum feitum skattaneva úr útlandinum, limirnar í FFU eru fult skattskyldigur í Føroyum.

Tað er ein gyltur møguleiki sum føringar hava at kunna arbeiða uttanlanda, og tað at vit eru eftirspurdir, lati serskattaskipanirnar fáa frið, um tit skulu pilla við, so ger tað enn betri, og eggji fleiri at arbeiða uttanlanda.

5 samanbera vit føroyingin við norðmannin.

Ein føroyskur fiskimaður, sum siglir við norskum fiskiskipið, og býr í føroyum, og hevður eina inntøku uppá DKK 700000, kemur aftaná broytingarnar í nýggja skattauppskotinum, at gjalda aftana at samdøgurfrádráttur og sjómannafrádrátturin er avtikin/ minkaður at gjalda umleið 50% í skatti, umframt tey 8 % til Noreg, ialt 58 % meðan norski fiskimaðurin sum stendur við síðuna av honum og arbeiðir, skal gjalda 30% í skatti, tá er norsk folketrygd írokna, ein munur á DKK 196.000 aftaná skatt, hettar er ein sera ógvuslig skattahækking, sum als ikki kann góðtakast, og vit halda ikki politikkarir ikki geva sær far um hvussu ógvusligani hettarr rakar føroyska fuskimannin við norskum skipun, og tí fari vit at heita á fíggjarnevndina um als ikki at taka undir við hesum

6 valuta.

Eisini er norska krónan lækka 20% síðan 2020, so um allir fyrimunur skulu fjernast, er spurningurin um tað lønars seg at sigla við norskum fiskiskipið.

At 154B verður verður avtikin, koma vit veruliga at merkja, 8,2% í einum.

Je havi silgt í 31 ár við norskum fiskiskipum, havi dámt gott har, eri sera takksamur man hevður havt møguleikan, ikki eri kjansir til allar útisiglarar í føroyum, um teir skuldi vent heim aftur.

Hugsi at er tað ikki bara ein fyrimunur at man kemur inn í landið við peningi?

Kunna viðurskiftini ikki bara fáa frið? Ella geri tey betri og fá fleiri at arbeiða uttanlanda.

Hvat ger man so um alt verður samtykt, vænti nógvir serliga ungir menn ríma av landinum.

VH. Einar M Hammer.

Formaður í FFU.